## Articon skal byggja samferðsluhavnina í Suðuroy

**Mánadagin varð sáttmáli undirskrivaður ímillum Landsverkfrøðingin og Articon um at gera samferðsluhavnina í Trongisvági**

HAVNAGERÐ
*Áki Bertholdsen*

Tað verður byggifelagið Articon, sum skal gera samferðsluhavnina í Trongisvági.

Tað varð greitt mánadagin, tá ið sáttmáli varð gjørdur ímillum Landsverkfrøðingin og Articon um at gera samferðsluhavnina.

Tá ið tilboðini vórðu latin upp 18. juni, hevði Articon lægsta boðið á góðar 51 milliónir.

Síðani hevur Landsverkfrøðingurin kannað øll tilboðini nærri. Eitt nú høvdu tey, sum bjóðaðu ymisk fyrivarni og eitt endamál við kanningunum var at vita, hvat øll hesi fyrivarnini merktu í krónum og oyrum fyri byggingina.

Men tá ið avtornaði og øll fyrivarni vórðu gjørd upp, hevði Articon framvegis lægsta tilboðið, og síðani hava samráðingar verið við felagið um ein endaligan sáttmála og hann var undirskrivaður mánadagin.

Tilsamans er samferðsluhavnin mett at 60 milliónir, tá ið alt er talt við, bæði byggileiðsla, eftirlit og atkomumøguleikar hjá ferðafólki til gongu, boðaði Landsverkfrøðingurin frá í gjáramorgunin.

Jenis av Rana:

# Ber ikki til at alivinnan fær almennan stuðul

**– Eg dugi ikki at síggja, hvussu landskassin kann veita alivinnuni almennan stuðul, sigur Jenis av Rana, formaður miðfloksins í samgonguni**

KREPPUHJÁLP TIL ALIVINNUNA
*Áki Bertholdsen*



*– Bankarnir hava forvunnið nógvan pening upp á alivinnuna. Og har teir hava lagt til brots, mugu teir eisini sjálvir rógva í land aftur, sigur Jenis av Rana*

-– Eg dugi ikki at síggja, hvussu vit kunnu fara at lata alivinnuni almennan stuðul.

Jenis av Rana, formaður miðfloksins, sum eisini er í samgongu, væntar ikki, at alivinnan fer at fáa almennan stuðul fyri at sleppa burturúr kreppuni.

Í fjølmiðlunum seinastu dagarnir hevur fólkaflokkurin róð framundir at geva alivinnuni almenna kreppuhjálp.

Men fólkaflokkurin er mestsum einsamallur um at halda, at hetta er eitt gott hugskot, tí sum tað framgongur av øðrum greinum í blaðnum, eru hinir samgonguflokkarnir alt annað enn samdir við fráboðanina frá fólkaflokkinum.

Ein av hinum floksformonnunum í samgonguni, Jenis av Rana úr miðflokkinum, sigur, at hann dugir ikki at síggja, hvussu tað almenna kann forsvara at lata alivinnuni almennan stuðul.

Hann minnir á, at alivinnan er ikki einasta vinnan í kreppu.

– Rækjuvinnan stendur eisini við eina aðra hurð í landskassanum og bankar uppá og veita vit einari vinnu stuðul, er skjótt, at aðrar vinnur í kreppu fara at krevja somu sømdir. Tì er almennur stuðul til eina vinnu, ein ómetaliga vandamikil kós at ganga, sigur Jenis av Rana.

### Sporini ræða

Hann heldur eisini, at sporini ræða.

– Tann tíðin, tá ið almennur stuðul at alla fíggjarorku upp, er eitt myrk kapittul í Føroya søgu. Og so var niðurstøðan eftir ta royndina harafturat, at allur tann ovurhonds stóru stuðulin til vinnuna ikki so frægt sum loysti nakran trupulleika.

Síðani hevur tað mestsum verið einmælt góðtikið í føroyskum politikki, at almennur stuðul til vinnuna er ein farin tíð.

– Tí dugi eg ikki at síggja, at vit fara aftur at leggja á tann bógvin, sigur Jenis av Rana.

Hann heldur eisini, at tað er mótsøgn í at lata stuðul til einstakar vinnur við aðrari hondini, samstundis sum vit við hinari hondini tosa um at selja alt tað, sum tað almenna bjargaði í sínari tíð.

– Tað kann ikki vera meiningin, at tað almenn bara skal spjaða til, tá ið á stendur, sigur formaðurin í miðflokkinum.

Hann sigur, at tað almenna eigur at gera alt, tað kann, fyri at skapa vinnuni fortreytir fyri at arbeiða.

– Men beinleiðis at stuðla vinnuni við peningaligum innspræningum er ikki okkara politikkur.

Hann minnir eisini á at landskassin er ikki ein kassi, sum fyllist av sær sjálvum.

-– Tað einasta, vit hava at fylla í landskassan, er tann skattur, vit taka frá fólki og tey, sum tosa um at spræna pening í alivinnuna, mugu so eisini halda, at skattatrýstið er ov lágt. Onkustaðni skal peningurin koma frá, men eg eri so ein av teimum, sum halda, at skattatrýstið er ivaleysa høgt, sum er.

– Tí ber ikki til at stuðla vinnulívinum, fíggjarliga og tað er ein vánalig loysn.

### Fólkaflokkurin lopin framav

Annars ger Jenis av Rana vart við, at spurningurin um almennan stuðul til alivinnuna er ikki viðgjørdur í samgongini og hann heldur, at tað er sera óheppið at fólkaflokkurin kemur við eini fráboðan um, at arbeitt verður við einum slíkum stuðuli, áðrenn tað er viðgjørt í samgonguni.

– Vit høvdu eina kreppu í vár og tá varð semja í samgonguni, at vit skuldu tosa saman innanhýsis, áðrenn slíkar fráboðanir komu út.

– Tað er ein grundregla vit hava havt, at vit skuldu tosa saman í samgonguni áðrenn, áðrenn slíkar fráboðanir, júst fyri at forða fyri, at samgongukreppur tóku seg upp av tí at einstakir flokkar boðaðu frá tiltøkum, uttan at hava tosað við hinar flokkarnar fyrst.

– Og tað, sum fólkaflokkurin fær burturúr hesum, er, at fíggingarstovnarnir seta seg upp afturá og dúva uppá almennan stuðul.

– Men tað eiga teir ikki at gera, tí teir skulu ikki vænta sær, at tað almenna bjargar alivinnuni. Vit vita, at bankarnir hava forvunnið ein hóp av pengum uppá alivinnuna. Og har teir hava lagt til brots, mugu teir eisini sjálvir rógva í land aftur, sigur Jenis av Rana.

Kári Højgaard:

# Stórur vandi at lata alivinnuni almennan stuðul

**Tað er óheppið, at fólkaflokkurin kemur við eini fráboðan um, at Alivinnan skal kanska hava almennan stuðul, uttan at tosa við samgonguna um tað fyrst**

KREPPUHJÁLP TIL ALIVINNUNA
*Áki Bertholdsen*

– Eg dugi ikki at ímynda mær, at tað almenna nú skal undir at veita alivinnuni almennan stuðul. Kári Højgaard, formaður sjálvstýrisfloksins, sum eisini er í samgongu, er ógvuliga ivingarsamur um ætlanina at lata alivinnuna almennan stuðul.

Í fjølmiðlunum seinastu dagarnir hevur fólkaflokkurin róð framundir at geva alivinnuni almenna kreppuhjálp.

Men tað tykist sum um at fólkaflokkurin er mestsum einsamallur um at halda, at hetta er eitt gott hugskot, tí sum tað framgongur av øðrum greinum í blaðnum, eru hinir tríggir samgonguflokkarnir alt annað enn fegnir um fráboðanina frá fólkaflokkinum.

Kári Højgaard er formaður í øðrum tí lítla samgonguflokkunum og hann dugir ikki at ímynda sær, at alivinnan fer at fáa almennan stuðul.

– Vit hava eisini eina rækjuvinnu, sum ekur á knøunum og tað er ótrúliga vandamikið at fara undir aftur at veita vinnuni almennan stuðul.

### Vinnan skal vera stuðulsfrí

-– Tað hevur verið almenni politikkurin, at vinnan skuldi vera stuðulsfrí og vit hava lagt okkum á tann bógvin, at tað almenna leggur karmarnar og skapar fortreytirnar og stuðla vinnuni óbeinleiðis við at seta pening av til gransking og til íverksetarastuðul til nýggjar vinnur.

– Men haðani frá, eigur vinnan at klára seg sjálv og tað hava vit alla tíðina, arbeitt fram ímóti.

Kári Højgaard sigur, á fíggjarlógini er ikki ett oyra sett av til fíggjarliga hjálp til alivinnuna ella til nakra aðra vinnu og hann sigur, at tað er nóg trupult at fáa endarnar at røkka saman, sum er.



*– Eg dugi ikki at síggja nakran møguleika hjá tí almenna at hjálpa alivinnuni burturúr trupulleikarnar, sigur Kári Højgaard, formaður sjálvstýrisfloksins*

– Tí dugi eg heldur ikki at síggja nakran møguleika hjá tí almenna at hjálpa alivinnuni burturúr trupulleikarnar.

Tað hevur alla tíðina verið politikkurin hjá samgonguni, at vinnan skal ikki hava almennan stuðul og fráboðanin hjá fólkaflokkinum um at nú verður kannað um almennur stuðul skal latast alivinnuni, brýtur sostatt fullkomiliga við almenna politikin higartil.

Og Kári Højgaard dylir heldur ikki fyri, at hann heldur, at tað er stak óheppið, at fólkaflokkurin kemur fram við slíkum.

– Eg skilji ikki, at fólkaflokkurin kemur við eini fráboðan um, at tað almenna kanska fer at hjálpa alivinnuni, uttan yvirhøvur at hava tosað við samgonguna um tað frammanundan og tað er ómetaliga óheppið, sigur Kári Højgaard.



P/F Vágatunnilin:

# Nú er tolið uppi

**Enn hevur gjaldskipanin, sum P/F Vágatunnilin keypti frá norska felagnum Q-free, ikki hildið eitt døgn uttan at ganga fyri. Norska gjaldskipanin riggar ikki saman við donsku PBS skipanini, men nú má okkurt gerast, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunnilin**

VÁGATUNNILIN
*Marjun Dalsgaard*

Gjaldsskipanin hjá P/F Vágatunnilin gongur fyri einaferð um tíman – onkuntíð hvønn fimta tíma og av og á ganga upp til 20 tímar ímillum, men enn hevur hon ikki klárað eitt samanhangandi døgn.

Norska felagið Q-free finnur ikki feilin og kann tískil ikki rætta hann. Gjaldsskipanin varð keypt sum liður í eini heildarloysn fyri umleið tveimum árum síðani, og tað er bert kortskipanin, sum ikki riggar. Tískil er tann parturin, sum riggar, goldin, og um uppsetta gjaldstøðin verður skift út, standast enn fleiri trupulleikar av, at fáa hana at rigga saman við tí upprunaligu heildarskipanini, heldur Reinhold Isaksen, verkfrøðingur hjá Partafelagnum Vágatunnilin.

### Finna ikki feilin

Stóri trupulleikin við gjaldstøðini er, at allir føroyskir peningastovnar brúka donsku gjaldskipanina PBS, men tað ger norska skipanin, sum føroyingar hava keypt, ikki – tí ber ikki altíð til at vátta flytingar. Tá Partafelagið Vágatunnilin keypti heildarloysnina frá norska Q-free, varð ein serstøk gjaldskipan gjørd, sum skuldi rigga saman við tí donsku gjaldskipanini PBS, og tað er júst hendan skipan, sum er orsøkin til, at gjaldstøðin við Vágatunnilin gongur fyri í heilum.

- Tað kann vera ein feilur í forritinum, men tað sær ikki soleiðis út – eingin veit, hvar feilurin liggur, sigur Reinhold Isaksen.

Stjórin í Partafelagnum Vágatunnilin sigur, at teir valdu norsku skipanina í sínari tíð, tí hon var bíligast í mun til funktionalitet.

- Tá vistu vit ikki, at tað fór at vera ein trupulleiki, at fáa skipanina at rigga saman við tí donsku – um vit vistu tað, høvdu vit sjálvsagt ikki valgt hana, sigur Dávur Reinert Hansen.

Trupulleikin kann eisini vera GSM-linjurnar, sum ikki altíð eru tøkar, um nógv tosa í fartelefon nærhendis. Tí er Føroya Tele við í arbeiðinum at finna orsøkina til trupulleikarnar við gjaldstøðini við Vágatunnilin, men enn hevur eingin nakra hylling av, hvat skal gerast, sigur Reinhold Isaksen.



*- Vit hava keypt eina skipan, sum skuldi rigga fra 10. december – tá latið varð upp fyri ferðsluni, og tað eru sjey mánaðir síðan. Nú er tolið uppi, sigur Dávur Reinert Hansen.*

- Tað einasta, vit kunnu gera, er at vóna, at teir finna feilin. Vit kunnu ikki blanda okkum í teirra arbeiði, vit hava bara keypt eina skipan, sum ikki riggar, sigur hann.

### Fyribilsloysn

Fyri at bøta um trýstið, sum stendst av, at upsetta gjaldstøðin við Vágatunnilin ikki riggar, vóru tveir leysir sokallaðir POINT-kortterminalar við GSM-skipan keyptir frá Føroya Tele í juni. Trupulleikin við teimum er bara, at teir tola ikki regn. Tað var hetta, sum gekk heilt galið eftir kappróðurin á Vestanstevnu, tá bíðiröðin rakk niðan til svingið oman fyri P/F Fútaklett. Partafelagið Vágatunnilin visti, at terminalarnir ikki kundu brúkast úti, um vátt var í veðrinum, men teir vórðu keyptir kortini, tí tørvur var á eini fyribilsloysn.

Dávur Reinert Hansen vil enn ikki siga nakað um, hvat næsta stigið er, men teir fara í holt við at loysa trupulleikan, sigur hann.

- Vit hava keypt eina skipan, sum skuldi rigga fra 10. december – tá latið varð upp fyri ferðsluni, og tað eru sjey mánaðir síðan. Nú er tolið uppi, sigur Dávur Reinert Hansen. Hann heldur tó ikki, at felagið fer at krevja peningin aftur, tí kubba-parturin av skipanini riggar væl, og tað loysir seg ikki at blaka tað fyri borð.




*Stóri trupulleikin við gjaldstøðini við Vágatunnilin er, at føroysku peningastovnarnir brúka donsku gjaldskipanina PBS, men tað ger norska skipanin, sum føroyingar hava keypt, ikki – tí ber ikki altíð til at vátta flytingar*